VIÐMERKINGAR

Talutrupulleikar hjá smábørnum í Suðurstreymoy

Hans Eli Dahl, s. stjóri

Innlit og álit

Í sosialinum tann 12. september hevur Annlis Bjarkhamar, landstýrismaður í mentamálum viðmerking til akuttu tørvin á taliundirvísing í Suðurstreymoy. Eisini setir hon spurnartekin við raðfestingina í penganýtsluni, t. v. s. umsitingarháttin í Sernámsdeplinum. Vit velja ikki at fata hatta sum tá "hvør steinur skuldi vendast" og tá tveir stjórar søðu upp upp við brestin. Víst sigur hon at enda, at "tað nýtist ikki at vera nakað galið við raðfestingini, men hon er sannførd um, at ein eigur fyrst at hyggja eftir, hvagar peningurin fer". Tað eru øll hjartaliga vælkomin til. Vit høvdu kortini væntað, at Mentamálaráðið við tí tilfari og tilmælum, ið vit hava sent teimum, kendi seg hava rímiliga gott innlit í sernámsfrøðiliga virksemið sum heild,og hvør veruligi játtanartørvurin er – altso kundi hjálpt landsstýrismanninum at funnið svarið til hennara egna spurning, "um stovnurin veruliga hevur tørv á meira peningi".

Stutt sagt: Vit høvdu eina vón um at fáa eina hjálpandi hond frá Mentamálaráðnum til loysn í justi hesum máli. Tað skulu vit altso ikki vænta. Í staðin " verður farið inn og hugt eftir raðfesting av pengum". Smábørnini í Suðurstreymoy hava ikki tíð at bíða eftir úrslitinum av slíkari kanning.

Ta neyðugu raðfestingina beint nú mugu vit sjálvi gera eftir umstøðunum beint nú.

Í okkara dagliga samstarvi og samskifti við skúlaleiðarar, lærarar, pedagogar, foreldur, feløg og brúkarar yvirhøvur møta vit bara vælvild og vælsignað tolsemi, ið er at undrast á. Forkláringin er, at øll hesi positivu fólk í samstarvinum/ - stríðinum hava fingið rættiliga gott innlit í virksemið og møguleikarnar hjá Sernámsdeplinum. Alla tíðina við vón um, at eisini politikararnir smátt um smátt fara at skilja eitt sindur, so meira rímilig játtan fæst. Í felag vóna vit framvegis.

Kroystast til lappaloysn

Vit mugu koma til ta niðurstøðu, at tað er órímiligt, at tørvandi smábørnini í Suðurstreymi einsamøll skulu svíða fyri tørvandi manning í Sernámsfrøðiliga virkseminum. Tí verður Annika Højgaard, ið er serlærari við drúgvum royndum á taliøkinum fyribils loyst frá taliarbeiðinum í Sernámsdeplinum. Tó verður hon framvegis her 2 tímar um vikuna, har hon er við í ráðlegging viðv. samskiftistrupulleikum, m.a. við kunning um alternativar samskiftishættir fyri børn, ið ikki kunnu tala. Umframt er hon 8 tímar um vikuna ráðgevi á Landsmiðstøðini fyri Undirvísingarameboð. Til taliundirvísing/ ráðgeving í Suðurstreymi saman við Doris Hansen, talilærara verða 14 tímar um vikuna.

Við hesum verður tørvurin í økinum ikki nøktaður. Tó verður hjálpt so frægt upp á trupulleikan, at tær hætta sær at fara undir taliundirvísingina. Í samráð teirra millum fáa stovnar og foreldur boð um, hvussu skipað verður og nær greitt er at byrja, væntandi innan 1. oktober.

Tænastustøðið lækkar

Vit hesi raðfesting er ein munandi trupulleiki fluttur inn í Sernámsdeplin. Arbeiðið í smábarnadeildini má umskipast heilt eftir nýggju umstøðum. Tað ger, at tænastustøðið í smábarnadeildini lækkar. Ein sera týðandi partur í sernámsfrøðini, eygleiðingar- og útgreiningararbeiðið verður darvað eins og arbeiðið við samskiftisbólkum fyri børn, ið eru málsliga sera illa fyri.

Vit vóna og vænta, at hetta bara er ein stutt fyribilsloysn, tí øll rokna við eini munandi hægri heildarjáttan til Sernámsfrøðina 2003.

Annita tann skinnhelliga

Hans Pauli Strøm, javnaðarmaður

Tað var ongin annar enn Tjóðveldisflokkurin, sum fyrstur og einastur kravdi, at Jenis - og harvið eisini Bill og alt tað fundamentalistiska kompaníið, sum hongur uppí í Miðflokkinum - kom til stjórnarvaldið í Føroyum. Bara av reinari maktpolitiskari girnd - tí uttan at taka Miðflokkin upp í føvningin, høvdu teir óivað sjálvir verið settir uttanfyri. Høgni Hoydal, Tjóðveldisflokkurin og málgagn teirra, Fregnir, vóru heitastu og ídnastu - (og einastu !!!) - forsprákarar fyri at Miðflokkurin skuldi sleppa framat stjórnarvaldinum í Føroyum.

Og soleiðis bleiv.

Og tað var Annita á Fríðriksmørk og øll hini í Tjóðveldisflokkinum, sum beinleiðis - ikki óbeinleiðis, men beinleiðis - valdu Bill og tann fundamentalistiska Miðflokkin í landsstýrið og lótu upp í hendurnar á teimum at ráða við fullum óskerdum myndugleika (sambært okkara stýrisskipan) yvir øllum heilsumálum, familjumálum og trivnaðarmálum.

Annita og Tjóðveldisflokkurin vita út í æsir, hvat Jenis, Bill og Miðflokkurin standa fyri. Sjálvandi vistu tey, at hesum ekstremistisku politiskt-átrúnaðarligu sjónarmiðum fóru tey at halda fast við - og virka út frá - í landsstýrinum.

Annita og hennara flokksfelagar eiga sjálvi alla ábyrgd av maktstøðuni hjá Bill, Jenisi og teirra kompaníi - og harvið eisini ábyrgdina av at hesin politiski-átrúnaðarligi minoriteturin fremur ta valdsmisnýtslu, sum hon pástendur.

Tað er tí onki annað enn skinnbarligt hyklarí, tá Annita og Tjóðveldisflokkurin nú rópa upp um, at Bill og kompaní nú brúka tað vald, sum teir fingu upp í hendur frá Annitu og kompaní, til at fremja tann politikk sum øll vita, at teir aldrin bakka frá.

Fundamentalisma

Kristian Magnussen, løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin

Hví halda ávís tjóðveldisumboð á tingi nú, at Miðflokkurin er ein trupulleiki? Miðflokkurin er ikki stórt ørvísi, enn Tjóðvelsisflokkurin. Hjá Bill og Jenisi er átrúnaðurin alibiið, og hjá Tobba og Anitu loysingin.

Báðir partar eru so sannførðir um egnan førleika og leiklut í politikki og at tey eru útvald at føra okkum inn í lovaða landið. Fígg-indi teirra er hin sami, Danmark, har alt óntk kemur frá, og har undirgravandi devlar liggja undir hvørjum steini. Báðir flokkar skíggja eisini demokratiið, sum eina proses, har úrslitið ikki er givið frammanundan.

Tey flestu hava ein samsettan identitet, har m.a. javnvág er ímillum átrúna og politikk, og harvið eru búgvin til semjur og sóma, meðan tað hjá Bill, Jenis, Anitu og Tobba tíverri er so, at ein partur av identiteti teirra, átrunaður og loysing, hevur tikið yvir og er vorðin allur identiteturin. Hetta fyribrigdið verður kallað fundamentalisma, og tí er ongin semja millum Miðflokkin og Tjóðveldisflokkin møgulig - teir eru ov líkir.

Kirkjan og kirkjufólkið

Heri Mohr

Í hesum døgum verður nógv skrivað og tosað uma t yvirtaka fólkakirkjuna, og tað tykist at vera politiskur meirluti í løgtinginum fyri at fremja hesa yvirtøku tó treytað av, at farið verður fram við spekt og sóma og eftir demokratiskum reglum, sum sømiligt er hjá fólki, ið sigur seg vera mentað og kristið.

Fyri at hetta fyriokkum so eyma og kensluborna mál kann fáa virðismikla og sømiliga viðgerð og avgreiðslu á okkara høga tingi, mugu árar leggjast út, og róð má verða við góðum áralai.

Men longui nú, áðrenn báturin er drigin úr neysti og flotaður, er manningin farin at klandrast og vil vera við, at bátsformaðurin ikki heldur seg til gjørdar avtalur. Nakrir av manningini vilja sleppa sær í bátin at sváva fólkakirkjuna, meðan onnur, sum ikki sleppa í bátin av teirri einføldu orsøk, tí kirkjan ikki er teirra, tevja mammonskar og umsitingarligar broytingar á kirkjuøkinum.

Nú hetta klandrið á lágum støði hevur tikið seg upp, er tað umráðandi, at bátsformaðurin (les: landsstýrismaðurin við mentamálum) mannar eina »kirkjunevnd« soleiðis:

Landsstýrið: Eitt umboð (mentamálaráðharrin?). Ein juristur.

Fólkakirkjan: Biskupur. 3 prestar. 2 umboð frá missiónum, sum hoyra til fólkakirkjuna.

Biskupur og ein juristur úr Danmark. Juristarnir eiga ikki at hava atkvøðurætt í nevndini.

Tað óivað stóra arbeiðið og rúgvusmikla tilfarið, sum nevndin letur úr hondum, má – og einki annað enn tað – latast løgtinginum til politiska viðgerð og avgreiðslu.

Men framum alt: verið varin og vælvirkin, tí »Kirkjan, hon er eitt gamalt hús…«

Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli og Tórshavnar Listaskúli

2002/2003

FRÍTÍÐIN

Treytað av nógv stórari undirtoku og myndugleikanna góðkenning bjóðar Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúli og Tórshavnar Listaskúli undirvísing í hesum lærugreinum skúlaárið 2002/2003:

Doyskurlyrikkin

Føroyskt, danskt, enskt, týskt, rokning/stoddfrøði, alisfrøði, evnafrøði.
Undirvísingin byrjar 21. oktober 2002 í Kommunuskúlanum.
Tilmelding á tlf. 31 77 55
Kostnaður kr. 350,- fyri hvørja lærugrein.

Barnarsvimjing

Føroyskt, danskt, enskt, týskt, rokning/stoddfrøði, alisfrøði, evnafrøði.
Undirvísingin byrjar 6. januar 2003 kl. 10.00 á Føroya Sjómannaskúla. Skúlagondin er um dagin, og søkjast kann um útbúgvningarstuðul frá Studningsstovnunum.
Tilmelding á tlf. 31 77 55
Kostnaður kr. 1200,-

Barnaskúlin

Mánaðarlotið 30. sep. 2002 kl. 19.00 byrjar dugnaskapanskeið í sigling á Føroya Sjómannaskúla. Undirvíst verður mánakvøld og mikukvøld kl. 19.00 - 22.30. Skeiðið endar við prøvuku, sum byrjar mánadagin 31. mars 2003.
Prógvið gevur tær rætt til at føra skip upp til 99 bruttotons í heimasigvi, um annars treytirnar við siglingartíð, sjón- og lækna váttan eru í lagi.
Umframt kravdu ítargreinirnar skipstøkni, sjóreglur og stoddfrøði verður eisini undirvist í tvíðan av veðurkortum. Í siglingarteru verður stórur dentur lagður á frálæru í GPS.
Tilmelding á tlf. 31 77 55
Kostnaður kr. 650,-

Barnaskúlin

Maskinlæra, ravmagnslæra, kolikoki, eldstakking og tænastukunnleiki
Dugnaskapanprógvið veitir rettindi til at passa motorar við framtokumegi upp til 612 HK í heimasigling, t.e. innan fyri 200 fjónðingar.
Undirvísingin verður á Maskinmeistaraskúlanum hósskvøld kl. 19.00-22.30
Byrjað verður 24. okt. 2002
Tilmelding á tlf. 31 77 55
Kostnaður kr. 650,-

Fyrir

30 tíma skeið – endar við prøvuku.
Undirvísingin verður á Sjómannaskúlanum mánakvøld, mikukvøld og fríggjakvøld kl. 19.00-22.30
Tilmelding á tlf. 31 77 55
Kostnaður kr. 350,-
Lærari Steinkór Jacobsen

Grafarar

Tilmelding tlf. 31 36 60 – 31 29 40
Týskvøld 17.00 – 20.30 Margith Glerfoss og Hósskvøld 17.00 – 20.30 Herbjørg Dalsgaard
Sankta Frans Skúli
Tilmelding tlf. 32 26 10
Kr. 1.040,00 Mánakvøld 18.40 – 22.10 og Mikukvøld 18.40 – 22.10 Bergljót J. Liengård - Gamla Reinsarið
Tilmelding tlf. 42 23 44

Kr. 670,00 Tilmelding tlf. 31 98 12 Týskvøld 19.00 – 22.30 Olaf Sneider Listaskúlin Kongagøta 7

Fyrir

Kr. 350,00 Tilmelding tlf. 31 77 55 Týskvøld 18.00 – 18.45 Randi Petersen - Læraraskúlin
Kr. 350,00 Týskvøld 19.00 – 19.45 -

Barnaskúlin

Kr. 420,00 Tilmelding tlf. 31 70 29 Mánakvøld 19.00 – 20.25 Elsa Petersen Kollafjørður

Fyrir

Kr. 350,00 Tilmelding tlf. 31 77 55 Hósdag 15.15 – 16.00 Olga Kallsberg - Eystuskúlin
Kr. 350,00 Hósdag 16.00 – 16.45 -

Barnaskúlin

Kr. 350,00 Tilmelding tlf. 31 70 29 Hósdag 16.45 – 17.30 Karin Djurhuus Eystuskúlin

Fyrir

Kr. 350,00 Tilmelding tlf. 31 70 29 Hósvkøld 17.30 – 18.15 Karin Djurhuus Eystuskúlin

Tilmelding tlf. 42 15 68
Kr. 350,00 Týskvøld 19.00 – 19.45 Gunnvá Dam Kollafjørður
Kr. 350,00 Týskvøld 19.55 – 20.40 -

Barnaskúlin

Kr. 300,00 Tilmelding tlf. 32 15 20 - 31 05 56
Friggjadag 16.30 – 17.15 Törunn Guttesen Eystuskúlin

Boys

Tilmelding tlf. 31 91 84
Mikudag 16.00 – 16.45 Hervør Eyðhusdóttir Landssjúkrahúsið svimjibylur

Barnaskúlin

Kr. 420,00 Tilmelding tlf. 32 02 11 Hósvkøld 18.15 – 20.50 Anna Christiansen Eystuskúlin, svimjibylur og skúlastova D 4

Fyrir

Tilmelding tlf. 32 02 14
Mikukvøld 18.15 - 19.00 Rubek Lilaa Eystuskúlin
18.15 - 19.00 -
19.00 - 19.45 -
19.45 - 20.30 -

Barnaskúlin – byrjar 30. sept.

Fyrir

Tilmelding tlf. 42 15 80
Mánadag 16.00 – 18.35 Anne Grete Harlou Eystuskúlin inngongd í Dj. í Geilgøtu

Barnaskúlin – byrjar 30. sept.

Tilmelding tlf. 42 15 80
Kr. 570,00 Mánakvøld 19.00 – 21.35 Anne Grete Harlou Eystuskúlin inngongd
Kr. 570,00 Týskvøld 16.00 – 18.35 - í Dj. í Geilgøtu
Kr. 570,00 Týskvøld 19.00 – 21.35 -
Kr. 570,00 Friggjadag 16.00 – 18.35 -

Barnaskúlin – byrjar 25. sept. og 27. sept.

Tilmelding tlf. 42 15 80
Mikudag 10.00 – 13.30 Anne Grete Harlou Tilhaldið í Tórsgøtu
Friggjadag 10.00 – 13.30 -

Barnaskúlin

Tilmelding tlf. 42 12 89
Kr. 670,00 Týskvøld 17.00 – 21.00 Edna Einarsson Kollafjørður
Kr. 670,00 Mikukvøld 17.00 – 21.00 -

Fyrsa

Tilmelding tlf. 31 78 41
Kr. 420,00 Mikukvøld 19.30 – 21.45 Bo Warberg Sjúkrasystraskúlin